HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur 2. desember 2021 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Laila Í. Hentze, Gunnvør Balle, Kristianna W. Poulsen og Hans Jón Thomsen.
Avboð: Jógvan Páll Fjallsbak, Leivur Simonsen og Jens á Skipagøtu.

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir
Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá:

1. **Vælkomin og góðkenning av fundarfrásøgn.**
   Fundarfrágreiðingin av skúlastýrisfundi hósdagin 18. november var góðkend.

2. **Uppskot til skriv, ið skal sendast Býarskipanardeildini í Tórshavnar kommunu.**
   Eitt uppskot til skriv, ið skal sendast Býarskipanardeildina í Tórshavnar kommunu, er orðað og verður gjøgnumgingið og gjørt liðugt.
   Skrivið verður dagfest 2. desember 2021 og sent Býarskipanardeildini.

3. **Uppfylging av aftursvari frá Tórshavnar kommunu, dagfest 7. juni 2021.**
   Tórshavnar kommuna boðar frá, at ferðmátingar eru í gongd við trimum radarum á Vegnum langa. Vísa ferðmátingarnar, at bilarnir koyra ov skjótt, verður beinanvegin farið at betra um ferðslutrygdina.

   Býarskipanardeildin og Tekniska deild í Tórshavnar kommunu arbeiða í løtuni við at skipað økið á Kirkjustræti/Karlamagnusarbreyt.
   Ætlanin er at gera eina "kiss&goodbye" skipan, soleiðis at ferðslan, ið kemur frá Kirkjustræti, kann fara avstað aftur, uttan at hon verður leidd niðan eftir Karlamagnusarbreyt.

   Tórshavnar kommuna kann einki gera við ferðslutrygdina á Hvítanesvegnum, tí talan er um landsveg. Kommunan vísir tí til Landsverk.

4. **Uppskot til foreldratiltak, sum skúlastýrið skipar fyri.**
   Fleiri evni eru í uppskoti frá limunum í skúlastyrinum.
   Niðurstøðan verður, at forkvinnan í skúlastýrinum skal venda sær til fyrilestrarhaldara, og leiðslan í Hoyvíkar skúla skal kanna møguleikan fyri at starva við skúlastýrið í Skúlanum við Løgmannabreyt um eitt felags foreldratiltak fyri báðar skúlarnar.

   Evnið verður tikið upp aftur á skúlastýrisfundi hósdagin 3. februar 2022.

5. **Kunning um nýggju grundupptøkuøkini fyri fólkaskúlar í Tórshavnar kommunu.**
   Sambært dagførdu leiðreglunum hava skúlarnir í Tórshavnar kommunu nú grundupptøkuøki. Hesi eru samtykt á fundi í Trivnaðarnevndini tann 15. november 2021. Grundupptøkuøkini eru gjørd við støði í talinum á børnum, sum hava aldur at fara í 1. flokk skúlaárið 2022/2023.
   Dagføringin ber í sær, at um so er, at pláss ikki er fyri øllum teimum innskrivaðu børnunum, sum búgva í grundupptøkuøkinum hjá einum skúla, er leiðreglan tann, at tey verða flutt í skúla í grannaøkinum, meðan tey børn, sum so møguliga ikki fáa pláss har, verða flutt eftir somu leiðreglu.
   Freistin at innskriva næmingar í 1. flokk skúlaárið 2022/2023 er sunnudagin 16. januar 2022.

6. **Ymiskt.**
   Skúlaleiðslan í Hoyvíkar skúla hevur verið í samband við Jóhan Syderbø, leiðara á Bygningsdeildini hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við, at ætlan hevur verið um at umvæla og nýtímansgera vesini í "Stóra skúla". Arbeiðið skuldi verið farið í gongd í summarfrítíðini 2021.
   Arbeiðið hevur drigið út, tí bíðað hevur m.a. verið eftir tilfari, ið er bílagt úr Danmark.
   Byggitakarin hevur harafturat upplýst, at arbeiðið fer at taka millum tríggjar og fýra vikur.
   Í hesum sambandi hevur leiðslan í Hoyvíkar skúla mælt til, at arbeiðið verður útsett til summarfrítíðina 2022, tí mett verður, at umvælingararbeiðið kemur at órógva og ganga ov nógv út yvir skúlagongdina í gerandisdegnum.
   Hesum hevur Bygningsdeildin í Tórshavnar kommunu tikið til eftirtektar.

   Leiðarin á Byggideildini hjá Tórshavnar kommunu boðar samstundis frá, at umvælingararbeiði av brúsuviðurskiftunum í fimleikarhøllini verður upprað fest.
   Arbeiðið fer í gongd í januar 2022.
   Samstundis verða endaveggirnir í fimleikarhøllini umvaldir.

Fundurin lokin kl. 18:00.